# Viðgerðin av løgtingsmálum 91 og 92/2004

## Nakrar greinir úr Stýrisskipan Føroya

Løgtingslóg nr. 103 frá 26. juli 1994 um stýrisskipan Føroya

**§ 14.** Løgtingsformaðurin boðar til løgtingsfundar og kunnger samstundis dagsskrá. Formaðurin hevur skyldu til at boða til fundar uttan óneyðuga dvøl, um so er, at í minsta lagi tveir fimtingar av tingmonnum ella løgmaður skrivliga biðja um fund við dagsskrá.

**§ 15.** *Stk. 2.* Uppskot til løgtingslóg ella ríkislógartilmæli kann ikki verða endaliga samtykt, uttan at tað hevur fingið tríggjar viðgerðir á løgtingi.

**§ 16.** Løgtingið ásetur sjálvt tingskipan sína, sum inniheldur nærri reglur um málsgongd og skilhald.

## Nakrar greinir úr Tingskipanin Føroya Løgtingsins 1999

Heimilað í løgtingslóg nr. 103 frá 26. juli 1994 um stýrisskipan Føroya § 16 hevur løgtingið á løgtingsfundi hin 1. juli 1995, 15. mai og 23. apríl 1999 ásett:

**§ 14.** Formansskapur løgtingsins er hitt hægra fyriskipaða stýrið í løgtinginum og umboðar tingið úteftir. Formansskapurin skal tryggja, at løgtingsumsitingin virkar væl og tíðarhóskandi í allar mátar.
*Stk. 2.* Umframt viðger formansskapurin ítøkilig mál, ið sbrt. tingskipanini skulu leggjast fyri formansskapin, mál av grundregluligum týdningi og/ella stórum týdningi, og mál, sum annars skulu verða viðgjørd...

**§ 17.** Formaðurin ansar eftir, at arbeiði løgtingsins verður væl fyriskipað og úr hondum greitt.
*Stk. 2.* Formaðurin stýrir umrøðum løgtingsins og ansar eftir, at alt er í góðum skili, og at viðgerðin er virðilig. Løgtingsmaður skal geva seg undir avgerð formansins.

**§ 22.** Løgtingsskrivstovustjórin ella starvsfólk hansara, sum hann tilnevnir til tað, hevur um hendi hesi størv:
2. hann er ráðgevi løgtingsformansins í øllum løgfrøðiligum og øðrum spurningum,
6. hann ansar eftir, at øll tingmál eru løgfrøðiliga og málsliga røtt,
9. hann er løgfrøðiligur ráðgevi hjá flokkunum og tingmonnum.

*Stk. 2.* Samstarv løgtingsformansins og løgtingsmanna við fyrisiting løgtingsins gongur um skrivstovustjóra løgtingsins.

**§ 76.** Atkvøðugreiðsla á løgtingi er á telduskipan. Løgtingsmenn atkvøða antin fyri, atkvøða ímóti, ella atkvøða ikki. Telduskipanin skrásetir, hvussu hvør einstakur hevur atkvøtt í einstøku málunum.

**§ 77.** Løgtingsmál er sbrt. stýrisskipanarlógini § 18 samtykt, eru fleir enn helmingur av øllum

tingmonnum á fundi, og fleiri atkvøður eru fyri enn ímóti. Eru líka nógvar atkvøður fyri og ímóti, er málið fallið.

**§ 79.** Heldur løgtingsformaðurin, at allir tingmenn eru samdir, kann hann gera tinginum kunnugt, at mál er samtykt, og atkvøðugreiðsla er ikki. Mælir tingmaður tá í somu løtu ímóti, verður tó vanlig atkvøðugreiðsla.
*Stk. 2.* Vanlig atkvøðugreiðsla skal altíð vera, tá ið samtykt skal verða endaligt løgtingslógaruppskot, ríkislógartilmælisuppskot, uppskot til samtyktar, val av løgtingsformanni, løgmanstilnevning ella misálitisuppskot á løgmann ella landsstýrismann. Harumframt skal vera vanlig atkvøðugreiðsla, tá ið løgtingið samtykkir at víkja frá tingskipanini sbrt. § 85.

**§ 85.** Í sera átrokandi førum kann, eftir uppskoti frá formanninum ella eftir skrivligum uppskoti frá 6 tingmonnum, verða vikið frá tingskipanini við teirri treyt, at tingskipanin er ikki grundað á lógarreglur, og við teirri treyt, at í minsta lagi tríggir fimtingar av tingmonnum á fundi greiða atkvøðu fyri.

# Útgreining av málunum

Sambært § 76 hava tinglimir rætt til at fáa sína atkvøðu skrásetta á telduskipanini, sum brúkt verður til løgtingsins atkvøðugreiðslu. Og sambært løgfrøðiligari grundreglu, sum er meir enn túsund ára gomul á okkara leiðum, eru øll líka fyri lógini. Allir tinglimir hava sama rætt at fáa sína atkvøðu skrásetta í telduskipanini.

Løgtingsmeirilutin við løgtingsformanninum á odda skar 6. mai 2005 ígjøgnum og lýsti atkvøðugreiðslurnar í tingmálum 91 og 92/2004 at verða avgreiddar, hóast at allir tinglimir á fundi ikki høvdu greitt atkvøðu. Hetta fór fram uttan um stýrisskipanarlógina og tingskipanina og var tískil framt í heimildarloysi.

Til ber at víkja frá tingskipanini í serliga átrokandi førum sambært § 85 í tingskipanini, men hetta krevur, at formaðurin skjýtur hetta upp, ella at 6 tingmenn koma við skrivligum uppskoti um hetta. Atkvøðugreiðsla skal eisini til áðrenn víkjast kann frá tingskipanini.

Eingin ivi er um, at løgtingsmeirilutin valdi at víkja frá tingskipanini og skerja rættindini hjá 10 tinglimum. Men hetta varð gjørt uttan uppskot um at víkja frá tingskipanini, og tískil eisini uttan atkvøðugreiðslu um hetta sama. Heldur eingin segði hetta vera eitt serliga átrokandi føri, sum kravdi serligar mannagongdir. Tí varð hetta framt í heimildarloysi.

Sambært § 16 í stýrisskipanarlógini ásetir løgtingið sjálvt tingskipan sína. Tingið skal hava eina tingskipan. Av hesum skilji eg, at hon eisini skal haldast. Frávik frá tingskipanini skal eisini fara fram sambært galdandi reglum, og tí sambært tingskipanini sjálvari. Og sambært tingskipanini kann frávik frá tingskipanini bara fara fram, um tað er lógligt. At bróta tingskipanina er soleiðis eisini brot á stýrisskipanarlógina. At bróta stýrisskipanarlógina er meira álvarsligt enn vanligt lógarbrot.

Um atkvøðugreiðslan er endað áðrenn allir tinglimir á fundi hava greitt atkvøðu sambært galdandi reglum, er atkvøðugreiðslan ikki liðug. Øll eru líka fyri lógini við slíkari framferð. Tí er 2. viðgerð av løgtingsmálum 91 og 92/2004 ikki liðug enn. Velur meirilutin á tingi at hava triðju viðgerð uttan at gera aðru viðgerð lidna fyrst, eru málini ikki viðgjørt sambært lógarreglum, og kunnu tískil ikki fáa løgligt gildi.

Eftir løgræðisgrundregluni, sum er upp ímóti túsund ára gomul í Føroyalandi, skulu allar lógir samtykkjast og kunngerðast á rættan hátt áðrenn tær fáa løgligt gildi. Hetta er eisini galdandi fyri løgtingsmál 91 og 92/2004.

Viðgerðin av tingmálum 91 of 92/2004 er tískil brot á løgræðisgrundregluna. Lóg kann bara broytast við lóg, og allar grundreglur skulu samtykkjast og setast í gildi eftir galdandi reglum.

Útvarp Føroya segði fríggjakvøldið 6. mai frá ónevndum serfrøðingum, at tinglimir áttu at gera eftir formansins boðum í hesum førinum og atkvøða tá atkvøðugreiðslan var fyri. Løgtingsformaðurin segði framferðina hjá hesum 10 tinglimunum vera óskikk. Tingmaðurin Anfinn Kalsberg segði, at tinglimir skulu geva seg undir avgerð tingformansins.

Vert er at leggja til merkis, at eingin av hesum vísti til greinir í stýrisskipanarlóg, tingskipan ella aðrastaðni. Tí haltar henda átalan ímóti framferðini hjá hesum 10 tinglimunum so mikið nógv, at hon ikki kann takast fyri fult.

Sambært § 17 stk. 2 í tingskipanini skal tingmaður geva seg undir avgerð tingformansins, men henda greinin snýr seg um málburð á tingsins røðarapalli. Onga aðrastaðni er ásett, at tinglimir skulu gera eftir boðum løgtingsformansins.

Sambært § 14 í stýrisskipanarlógini er tað løgtingsformaðurin, sum setir dagsskránna. Tað er eisini hann, sum er fundarstjóri. Tískil er tað hann, sum avger, nær atkvøðast skal.

Men ongastaðni stendur, at tinglimir skulu atkvøða, tá tingformaðurin gevur boð um hetta.

Harafturímóti skal tingformaðurin sambært § 17 í tingskipanini ansa eftir, at arbeiði løgtingsins verður væl fyriskipað og úr hondum greitt. Tingformaðurin skal syrgja fyri at alt gongur fyri seg á rættan hátt, t.e. sambært reglum og lógum. Sambært § 22 í tingskipanini hevur løgtingsskrivstovustjórin ella starvsfólk hansara, sum hann tilnevnir til tað sama, eftirlit við, at øll tingmál eru løgfrøðiliga og málsliga røtt. Hesi løgtingsskrivstovustjórans starvsfólk eru eisini flokkana og tingmanna løgfrøðiligur ráðgevi.

Um 10 tinglimir nokta at atkvøða við teirri grundgeving, at tingmál ikki er løgfrøðiliga rætt, kann tað tískil vera løgtingsformansins og formansskapsins trupulleiki og ikki teirra 10 tinglima. Samstundis sum tingformaðurin hevur heimildir, hevur hann eisini skyldur.

Løgtingsformaðurin kann ikki við harraboðum krevja at tinglimir skulu gera eftir boðum sínum, tá hann ikki sjálvur vil røkja sínar egnu skyldur. Líka mikið hvussu høga tign tingformaðurin hevur, og líka mikið hvussu stóran meiriluta av tinginum hann hevur aftanfyri seg, so eru reglurnar eisini galdandi fyri tingformannin og formansskapin. Tingformaðurin og formansskapurin skulu fylgja landsins lógum.

Sambært uppriti frá løgtingsskrivstovustjórans starvsfólki eru álvarsligar mótsagnir í tingmálum 91 og 92/2004. Málini bæði eru fullkomiliga mótsigandi, metir løgfrøðiligur ráðgevi løgtingsformansins eins væl og flokkana og tingmanna. Ein trupulleiki við málunum er, at løgtingið sambært viðmerkingunum í tingmáli 92/2004 avtekur allar sínar heimildir sum ting, sum tað samtykkir hetta málið, meðan tað sambært viðmerkingunum í tingmáli 91/2004 varðveitir og vinnur enn fleiri heimildir. Ilt er at siga hvørjar avleiðingarnar vera, um bæði verða samtykt av Føroya løgtingi.

Tó at tað ikki er sjálvsagt, so er nærliggjandi, at donsku viðmerkingarnar fara at viga tyngri, tá samtyktirnar skulu tulkast. Og tað merkir, at Føroya løgting, við at samtykkja bæði uppskotini, hevur givið allan yvirvaldsrætt til danskar myndugleikar. Og tað merkir, at danir kunnu niðurleggja løgting og landsstýri við vanligari fólkatingslóg. Lat meg her minna á, at Løgtingið er niðurlagt á henda hátt fyrr.

Sambært § 14 stk. 2 í tingskipanini viðger formansskapurin mál av grundregluligum týdningi og/ella stórum týdningi. Hetta er ikki nakað, sum formansskapurin av sínum eintingum velur at gera, men ein skylda. Hetta er nakað, sum formansskapurin skal gera, um tað er viðkomandi, og um tinglimir ynskja tað. Og um hesi málini ikki eru av grundregluligum ella stórum týdningi, so munnu fá vera tað. Tingformaðurin misrøkir sínar skyldur, um hann noktar fyri at viðgera málið.

Um tinglimir krevja at fáa málið viðgjørt sambært tingskipanini, so má og skal málið verða viðgjørt sambært tingskipanini, eisini frá formansins og formansskapsins síðu. Harafturat kann tingviðgerð ikki fara fram við einum formanni og formansskapi, sum ikki vil røkja sínar skyldur.

## Niðurstøður

Samanumtikið kann sigast, at løgtingsformaðurin hevur ikki røkt sínar skyldur við at ansa eftir at tingsins arbeiði er væl fyriskipað, tá hann uttan himpr er til reiðar við løgtingssamtykt at avtaka allar heimildir tjóðartings føroyinga. Hann hevur ikki lurtað sínum egnu ráðgevum í týðandi grundregluligum og stórum málum. Eiheldur hevur hann gjørt sína skyldu við at lurta eftir tinglimum, tá teir hava biðið hann viðgera týðandi mál sambært tingskipanini. Hann hevur fullkomiliga misrøkt sínar skyldur sum ásettar í føroyskari lóg og reglum.

Harafturímóti er meirilutin av tinginum farin útum sínar heimildir við at taka rættindi frá 10 tinglimum og seta tingskipanina til viks uttan atkvøðugreiðslu. Eisini í hesum heimil-

darbroti hevur formaðurin misrøkt sína skyldu at ansa eftir, at arbeiði løgtingsins verður væl fyriskipað og úr hondum greitt. Og við at krevja at tinglimir skulu gera eftir boðum sínum, tá hann ikki sjálvur vil fylgja tingsins egnu skipan, hevur hann brotið grundregluna um, at øll eru líka fyri lógini.

Tingformaðurin og løgtingsmeirilutin uttan teir 10 tinglimirnar eru farin út um sínar heimildir sambært stýrisskipanarlógini og tingskipanini. Tingskipan skal vera, og um hon er, skal hon haldast. Vil løgtingið víkja frá tingskipanini, so skal eisini hetta fara fram á rættan hátt eftir rættari mannagongd.

2. viðgerð av tingmálum 91 og 92 /2004 er ikki liðug og má tí vera á tingfundi umaftur, skulu uppskotini fáa lógarligt gildi. Fer 3. viðgerð fram uttan at gera 2. viðgerð lidna fyrst, er skeivt farið fram, og tí helst rættast, at málini eiga at verða burturvíst.

Tað kann væl vera, at teir 10 tinglimirnir hava verið óskikilligir. Men tað hevur tingmeirilutin og serliga tingformaðurin so sanniliga eisini. Harafturat hava tingmeirilutin og serliga tingformaðurin framt brotsverk, misrøkt sínar skyldur, eru farnir útum sínar heimildir og hava skert rættindini hjá øðrum tinglimum. Sjálvur at fremja brotsverk og ákæra mótpartin fyri at vera óskikkiligan ger ikki støðuna betri, heldur tvørturímóti.

Víst skal her vera á, at Føroya løgting 25. septembur 1946 varð sent til hús fyri nógv minni enn tað, ið meirilutin av løgtinginum gjørdi 6. mai 2005. Var avgerðin røtt at senda tingið til hús í 1946 og skriva nýval út, so er helst eisini rætt at gera hetta sama nú, um málini ikki verða burturvíst. Slíka framferð kann Føroya løgting í øllum førum ikki brúka.

Onkrar avleiðingar mugu standast av hesum. Lóg kann ikki setast í og úr gildi soleiðis í Føroyum. Í allra minsta lagi eigur viðgerðin at steðgast, meðan málið verður kannað.

Í Gundadali 9. mai 2005,

Jógvan Jacobsen,

lesandi á Fróðskaparsetri Føroya.